# Verða vit gráir ella knáir?

TÓRA VIÐ KELDU
Lærari í Skúlanum við Ósánna



Eg gleðist um, at fólkaskúlin er settur á dagsskránna, og at tað verður roynt at seta inn, har tørvur er á. Skúlin hevur leingi havt tørv á einum lívligum kjaki við munadyggum og gevandi kritikki. Tó eru klár tekin um, at okkurt er farið av sporinum, og fleiri lærarar fara aðrastaðni enn í skúlan at arbeiða. Her havi eg hug at varpa ljós á ein av trupulleikunum í fólkaskúlanum í dag.

**Skúlin fingið nýggjan ham**

Eg havi longu arbeitt sum lærari í seks ár, á tveimum ymiskum skúlum. Bara hesi 6 árini er skúlin heilt nógv broyttur. So um vit tosa um skúlan, eg sjálv var næmingur í, er hetta ein heilt onnur verð. Sjálvandi er tað náttúrligt við broytingum, og nógar eru eisini til tað betra. Vit fóru miðskeiðis í 90unum at kalla fólkaskúlan fyri "Skúlin fyri øll". Sjálvandi skal skúlin vera fyri øll, men í dag síggja vit, at skúlin skal vera fyri øll og rúma øllum – ja, skúlin við øllum. Fyrr var skúlin bara skúli, og lærarar bara lærarar, men í dag er skúlin meir ella minni ein vavstur av óteljandi uppgávum, sum lærarar skulu taka sær av og brúka tíðina til.

**Skyldur skúlans**

Fólkaskúlin eigur og skal røkja skyldur, sum menna og strimbra næmingarnar. Skúli og kommuna skulu í felag skapa góðar karmar til næmingarnar at læra, og her er trivnaður ein týðandi partur. Vit skulu minnast til, at fakligu krøvini til næmingarnar eru ikki smá, tí mugu umstøðurnar vera góðar. Eg skal ikki avgera, hvat er neyðugt ella minni neyðugt fyri skúlan at røkja. Tó kann eg her nevna bara nakrar uppgávur, sum í dag eru ein náttúrligur partur av skúladegnum, men sum veruliga taka dýrabara tíð burtur frá ætlaðu undirvísingini: eta við næmingum, tannlækni, heilsusjúkrasystir, prestur, Bláikrossur, Ferðslutrygd, Fyrstahjálp, Trygdarskeið, upplýsing um framhaldsskúlar, vitjan á SEV, Datueftirlitið, Roykipolitikkur og afturat hesum, eru næmingarnir náttúrliga burtur frá undirvísing onkuntíð í privatum ørindum og onkur fer at ferðast í skúlatíð – tí tað er bíligari.

Hóast alt hetta er partur av dagsins skúla, er samlaða tímatalið ikki merkisvert økt, ella tímarnir longri, men skúlin hevur seinastu árini fingið ótalligar uppgávur, sum ikki beinleiðis eru fakligar. Pensum er tað sama og krøvini í veruleikanum herd. Hvar seta vit markið? Vit mugu bara síggja sannleikan í eygunu og erkenna, at vit náa ikki alt. Okkurt má liggja uttanfyri skúlan ella skúlatíð.

**Lærarar eru undirvísarar**

Í hesum kravmiklu PISA-døgum, har hart verður sett inn á skúlan, og tosað verður um at seta størri krøv til lærarar og næmingar, havi eg hug at siga: "Lat okkum lærarar sleppa at undirvísa". Tað er ein almennur vaksandi trupulleiki, at lærarar heldur velja onnur støv enn lærarastarvið. Hetta er ein álvarsamur trupulleiki, sum als ikki undrar meg. Lærarar eru fyrst og framst undirvísarar og um fakkunnleikin minkar við fleiri "óviðkomandi" uppgávum, hvar kennir lærarin so sítt pláss? Eg haldi, at her er farið av sporinum.

Vit skulu vera millum fremstu lond í 2015 við besta skúla, men um vit hugsa um skúlaskap og fakkunnleika, skilji eg ikki heilt, hvussu vit skulu røkka málinum. Skulu vit gerast best, mugu vit vera meir málrættað og vita, hvat vit vilja – og sjálvandi krevja eitt sindur av hvørjum øðrum. Virðing og álit í góðum samstarvi millum heim og skúla er avgerandi fyri skynsamum og neyðugum disciplini. Føroyar eru lítið og yvirkomiligt land, men hvar eru okkara eyðkenni sammett við stór lond? Tað einasta sum kann geva okkum ein góðan og dynamiskan fólkaskúla er vælútbúnir lærarar, góðir karmar og næmingar/foreldur, sum eru við. Latið foreldur vera foreldur at børnunum og lærararnar vera undirvísarar – og fáa rúm at undirvísa.

**Gráir ella knáir næmingar?**

Skúlin hevur grundleggjandi týdning fyri land okkara, tað er fortreyt fyri lærdómin hjá børnum og ungdómi. Hetta eru børn og ung, sum eftir skúlatíð hava møguleika at røkja alskyns persónlig áhugamál – sum ofta verða sett fram um skúlan, tó skúlin er einasta stað, børnini við lóg eru bundin at. Um ov nógv verður lagt inn í skúlan er vandin sjálvsagt, at vit bara ala "gráar" næmingar, sum eru toliligir í øllum, og ikki úrmælingar á nøkrum øki. Heldur knáir enn gráir næmingar, um eg sum lærari sjálv skal velja.

Tað kundi verið so nógv annað at trivið í, men eg lati tað liggja til seinni.

# Hava børnini átrúnaðarligt frælsi?

HELGI BREINER
Korsør



Miðflokkurin spyr til rættindini hjá fostrum. Tað er svar til Høgna Hoydal, sum hevur sagt, at spurningurin um samkynd er ein spurningur um rættartrygd, meðan spurningurin um fosturtøka er ein etiskur spurningur.

Men um fostrini skulla hava rættindi, skulla børnini væl eisini hava tað. Og hvussu er tað við átrúnaðarlig rættindi og frælsi hjá børnum? Í nógvum familjum í Føroyum verður lagt ógvuligan stóran dent á, at børnini hava somu trúgv sum foreldrini. Men er tað rímiligt í einum frælsum og demokratiskum samfelagi? Tí tað kann ikki vera rætt, at vit eru kristin ella muslimar, tí familjan kanska hevur indoktrinerað og hjernavaskað okkum ella hava valt átrúnaðin fyri okkum. Nei, vaksin fólk eiga sjálvi at velja sína trúgv, sum er best fyri tey - og familian og trúarsamfeløg eiga at viðurkenna tey, um tað so blívur ein onnur trúgv.

Tað er óhugnaligt, tá nøkur børn blíva so sálarliga oyðiløgd av fanatiskum átrúnaði, at tey ikki tora at kanna aðrar trúðargreinir, tí tey eru bangin fyri avleiðingarnar. Samfelagið eigur tí at ansa nógv betur eftir børnunum, so tey sjálvi kunna verða før fyri at velja sín átrúnað - eisini tá tey verða vaksin.

# Fleirfald løn til landsstýrismenn skal burtur

KÁRI P. HØJGAARD OG KÁRI Á RÓGVI
Sjálvstýrisflokkurin





**Sjálvstýrisflokkurin hevur tikið aftur uppskotið um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna. Heldur enn eina partvísa loysn nú, ynskir flokkurin eina heildarloysn eftir tilmæli frá óheftari nevnd**

Heldur enn eina partvísa loysn nú, meit Sjálvstýrisflokkurin vera skilabetur, at landsstýrið setir eina óhefta nevnd at fyrireika broytingar í lønarviðurskiftum løgtings- og landsstýrismanna. Broytingarnar fara vónandi at føra til, at møguleikin at fáa fleirfalda løn fellur burtur.

Tí hava teir báðir tingmenninir hjá Sjálvstýrisflokkinum gjørt av at taka aftur løgtingsmál nr. 132/2007: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna.

Sjálvsstýrisflokkurin fer ístaðin, saman við øðrum flokkum, at leggja fram uppskot til samtyktar, ið heitir á landsstýrið at seta óhefta nevnd at viðgera øll viðurskifti í sambandi um samsýning og eftirløn landsstýrismanna.

# Jóansøkufestivalurin 2008, sum bleiv av ongum

KRISTIAN HOLBÆK
Tvøroyri



Eg havi varhugan av, at rættuliga nógvir vágbingar ynskja ein festival á Jóansøku, og kundi tí hugsað mær at hoyrt teirra meting av niðurstøðuni hjá Vágs Býráð. Eg ivist stórliga í, um fólk í tónleikaliga umhvørvinum í Vági eru samd í niðurstøðuni.

Eg havi verið við til at fyriskipa Jóansøkufestivalin 3 ár á rað. Hvørt ár hevur kostað mær eina mánaðarløn í mistari arbeiðsinntøku. Tað sama er galdandi fyri fleiri aðrar fyriskiparar, og eg veit, at summir beinleiðis hava verið noyddir at tikið frí frá arbeiði í vikuvís, fyri at fáa festivalin at eydnast. Tað er eitt tógvi stríð at fyriskipa ein festival, og um tú so harnæst skal gjalda gildið sjálvur, so skal stórur eldhugi og idealisma til.

Fyri at seta tingini í perspektiv, kann eg upplýsa, at stuðulin, sum Vágs kommuna lat í 2007 og tann sum Tvøroyrar kommuna lat í 2006, svarar til tann pening, sum eg persónliga misti í manglandi arbeiðsinntøku. Og samlaði kommunali stuðulin svarar til tað, sum allir fyriskipararnir mistu í arbeiðsinntøku tilsaman. Um kommunali stuðulin veruliga skal gera mun, so er neyðugt, at hann verður meir enn tvífaldaður í mun til tað, sum er latið higartil. Hesin peningur hevði, eftir mínari meting, komið fleirfaldaður aftur.

Í staðin fyri tað afturhaldandi og neiligu niðurstøðu, sum Vágs býráð stendur við, skuldu tey heldur verið takksom fyri, at - afturat ítróttarfeløgunum, sum gera eitt stórt arbeiði - eisini finnast nakrar eldsálir, idealistar, sum gera eitt megnar arbeiði, fyri at geva Suðuroynni eitt gott umdømi, og skapa ein pall fyri bæði nýggj og kend tónleikanøvn í Føroyum, og geva teimum ungu, ókendu tónleikaspírunum í Suðuroynni møguleikan at vísa, hvat tey duga. (The Dreams spældu á festivalinum 2005, og vóru teir tá nærum ókendir. Í dag kunnu vit øll gleðast um, hvussu langt teir eru komnir. Og hvør kennur ikki okkara egna Brand Enni? o.s.fr.)

Eg eri sannførdur um er, at jalig átøk og søgur eru altavgerandi fyri Suðuroynna í framtíðini.

Jóansøkufestivalurin hevur møguleika at mennast til eitt jaligt brand, sum kann geva Suðuroynni "good will" úti í verð, og hesum kunnu vit ikki fáa ov nógv av. Tann, sum ikki dugur at síggja møguleikarnir, sum liggja í hesum spennandi og mennandi tiltakið, sum eisini kann hjálpa til at selja Suðuroynna sum eina ferðavinnu-, skeið- og heilsuoyggj, er rættuliga visiónsleysur, eftir mínari áskoðan. Tí eri eg sera ósamdur við teimum sum siga, at festivalurin spennur bein fyri Jóansøkuni, tað hava teir 3 festivalarnir mótprógva, hóast vit í 2006 fingu ein undir vangan, reint fíggjarliga.

Um ein framhaldandi ynskir at fastlæsa Jóansøkuna, "soleiðis, sum hon altíð hevur verið"; eina Jóansøku, sum hevur alt minni góðsku at bjóða teimum gestum, sum ynskja og vænta okkurt nýtt og spennandi, so er hetta onki annað enn dømi um ein konservativan og stirvnan hugburð, sum ikki hjálpir Suðuroynni inn í framtíðina. Tá nú Asfalt og G-festivalurin heldur ikki verða til nakað í ár, so kenst tað enn meiri hugstoytt, at Jóansøkufestivalurin ikki sær dagsins ljós í ár, tí hann kundi so avgjørt verið við til at nøkta tann festivaltørv, sum er skaptur her á landi.

At so mynduleikarnir hava valt at áleggja festivalunum MVG, kann sigast at vera "steinum omaná byrðu", ein vanlukku fyri festivalarnar, og sum var ein av orsøkunum til at G-festivalurin snávaði so álvarsliga. Syrgiligt, at besta festivalinum í Føroyum ikki er lív laga, orsakað av manglandi politiskum framskygni ( og møguliga eisini av ov vánaligari fíggjarligari stýring).

Tað er óseriøst tá Vágs býráð sigur, at: "tey fegin vilja stuðla einum Jóansøkufestivali, hann má bara ikki vera á Jóansøku" – tí tað er sjálvt hugskotið aftan fyri tiltakið. Nevnliga, at spræna nýtt og veitslukent lív í gomlu, siðbundnu Jóansøkuna, og gera hana meiri fjølbroytta og spennandi fyri alt fleiri fólk, so henda fólkaveitsla eisini gerst eitt árligt hæddarpunkt, har møguleiki m.a. er fyri at uppliva stór og altjóða kend tónleikaranøvn.